## Anker í Gallerie Focus



Fríggjadagin 26. oktober klokkan 16 letur upp ein framsýning við verkum hjá Anker Mortensen í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu í Havn. Framsýningin er ein lýsing av náttúrumáttum, men eisini ein lýsing av okkara kensluliga veðurlag. Úrslitið eru málningar, ið fáa okkum at síggja tilveruna við nýggjum eygum og at merkja hana við endurnýggjaðum sansum og styrki. Framsýningin verður opin fram til 8. november.

## Sólstein: skerjingin fær avleiðingar

Skerjingin í svartkjaftakvotuni kann fáa stórar avleiðingar fyri føroyska uppsjóðarflotan og føroyska fiskivinnu sum heild. Tað metir Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, sum vísir á, at skerjingin hevur eitt avreiðingarvirði á 150-200 milliónir í dagsins prísum. Eisini hava Føroyar avtalu við Russland um at lata svartkjaft í býti við tosk í Barentshavinum. Og sum tað triðja kann skerjingin fáa avleiðingar fyri Havsbrún í Fuglafirði, sum kann rokna við munandi minni nøgdum komandi ár. Svartkjafturin er umleið 40 prosent av veiðuni hjá uppsjóðarflotanum, og tí kemur tað at merkjast hjá skipunum, sigur Jákup Sólstein við Rás2.

# So kom fólkatingsval kortini

**Síðani august hevur ljóðað, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, fór at útskriva nýval til danska fólkatingið, men ikki fyrr enn í dag gjørdist hetta veruleiki**

PARLAMENTSVAL
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Beint eftir middag skrivaði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, út val á fólkatingsins røðarapalli. Hetta merkir, at bæðir, føroyingar og grønlendingar skulu á val týsdagin 13. november*

Ígjøgnum mánaðar hava gitingar verið frammi um, at eitt fólkatingsval fór at koma. Longu í august varð roknað við, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, fór at útskriva nýval, men hetta hendi ikki tá. Ivaleyst tí, at stjórnin hevði stórar trupulleikar av viðurskiftunum hjá flóttafólki og fólki, ið søkja um friðskjól í Danmark, sum bæði politikarar og nógvir danir annars hava funnist at.

Um ikki heilt loyst, so hevur stjórnin lagt dent á at betra hesi viðurskiftini við átøkum, og tí eru atfinningarnar munandi minni nú, enn tær hava verið.

Sum heild eru tíðirnar góðar í Danmark, danir hava tað gott fíggjarliga, arbeiðsloysið er metlágt, og stjórnin lovar at halda fast við skattasteðgin, ið varð settur í verk, longu tá Fogh-stjórnin tók við fyri seks árum síðani.

Harafturat hevur stjórnin gjørt av, at Danmark skal taka seg aftur úr Irak. Júst Irak-kríggið og framhaldandi hjáveran av donskum hermonnum í ófriðaliga landinum, hevur givið stjórnini stórt høvuðbrýggj, tí størsti parturin av dønum eru ímóti hjáveruni.

Fogh metir ivaleyst, at stjórnin aftur stendur rættiliga sterk og velur tí at útskriva nýval nú við teirri grundgeving, at politiska myndin í Danmark er órógvað í løtuni. Hann vil tí reinsa luftina og tryggja stjórnini eitt betri grundarlag at halda fram.

Bæði Dansk Folkeparti við Piu Kjærsgaard og Ny Alliance við Naser Khader stuðla Vinstra-konservativu stjórnini hjá Anders Fogh Rasmussen, men stórur munur er á, hvønn politikk tey vilja hava stjórnina at føra í fremmanda- og flóttafólkaspurninginum. Bæði stíla ímóti at gerast avgerandi stuðulsflokkur hjá stjørnini. Ein støða, sum Dansk Folkeparti hevur havt seinastu seks árini.

Fólkatingsvalið í Danmark verður týsdagin 13. november, og hetta merkir sjálvandi, at føroyingar eisini skulu til val tá. Harvið fáa vit ein forsmakk uppá, hvussu føroysku flokkarnir standa seg til ta tíð, sjálvt um eitt fólkatingsval oftast fellur munandi øðrvísi út fyri flokkarnar, enn eitt løgtingsval, ið sum kunnugt kemur í seinasta lagi 19. januar.

## Smyril aftur í sigling fyrst í næstu viku

**Tað hevur gingið væl at gera ábøturnar á Smyrli og fríggjadagin fyrst í næstu viku er væntandi, at hann kemur aftur í sigling**



Tað hevur gingið avbera væl at gera tær ábøtur á Smyril, sum skuldi gerast.

Sostatt er eisini greitt, at tíðarætlanin fer at halda.

Tað merkir, at Smyril fer úr aftur Svøríki fríggjakvøldið og Regin Vágadal, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at tað er alt, sum talar fyri, at hann verður aftur í rutusigling ímillum Suðuroy og Havnina mánadagin ella týsdagin.

Hann fór til landskrona í Svøríki í dokk, men alt, sum skuldi gerast í sjálvari turrdokkini, er avgreitt, so nú er hann farin á flot aftur, har tað síðsta skal gerast, ímeðan hann liggur við bryggju.

Regin Vágadal sigur, at sostatt heldur tíðarætlanin til fulnar, tí alt er gjørt, sum skuldi gerast. Eisini eru stabilisatorararnir umvældir.

-Áki-

## Poul Michelsen fingið hatt



Tað sær ikki matari út, enn at heilsølan hjá Poul Michelsen hevur fingið nýggjan hatt – og tað hevur faktiskt fingið. Í gjár var stóri skipasmiðjukranin í ferð við at hiva eina nýggja yvirtrom oman á bygningin.

- Vit eru í ferð við at gera nýggjar skrivstovur á triðju hædd, sigur Poul Michelsen.

Nýggja yvirtromin er bygd í túninum og hivað upp á bygningin í heilum líki. Hon er 110 fermetrar til støddar og vigar umleið